gult2 cyan2 magenta2 svart2




Gerst kundi hjá Kalli nú, og njót allar fyrimunirnar

Nýggi tele- og internetveitarin

Ókeypis postkassar

Sum felagi hjá Kalli fært tú nú tveir ókeypis postkassar.
Navnið á telduposttaðunum er til dømis birita@kallnet.fo.

SANSIR TEL 355 355

**Ókeypis internet**

Tá tú fært telefonsamband hjá Kalli, fylgir altíð ókeypis internetsamband við.

**Síggj telefonnýtsluna á internetinum**

Sum nakað nýtt í føroyska teleheiminum bjóðar Kall nú sínum kundum ókeypis at síggja sína egnu telefon- og Internetnýtslu á internetinum. Síggj dømi um hetta á www.kall.fo



www.kall.fo

**Ring 20 20 20**
Gerandisdagar frá kl. 9.00 til 18.00.

kall
Orðið er títt

Kall · Óðinshædd 2 · Tel 20 20 20 · Fax 20 20 21
Postrúm 3299 · FO-110 Tórshavn · kall@kall.fo · www.kall.fo


gult3 cyan3 magenta3 svart3



# Hetta er lítið hugaligt

**– Tað er onki, sum bendir á, at málið um Teistan er á veg í tingið. Eftir mínum tykki er talan um eitt smámál,sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum**

ÓSEMJA
*Áki Bertholdsen*



*Ósemjan um Teistan er eitt smámál, heldur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum. Hann heitir á partarnar um at taka samráðingarnar upp aftur og at loysa málið*

– Hetta sær ikki serliga lovandi út.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, er harmur um støðuna, sum nú hevur tikið seg upp um nýggju sandoyarferjuna, Teistan.

Ósemja ímillum Fíggjarmálastýrið og manningarfeløgini um lønina hjá yvirmonnunum, hevur nú ført við sær, at Teistin hevur ligið svínabundin í tríggjar mánaðir, uttan at sleppa í rutusigling.

Nú er so semja gjørd við maskinmeistararnar, men enn røkist onki fyri eini semju við navigatørarnar.

Men samstundis, sum Bjarni Djurholm harmast um støðuna, ásannar hann, at hann fær onki gjørt.

– Tað eru hvørki vit, ella Strandferðslan, sum hava samráðingarrættin. Tað er Fíggjarmálastýrið og tí fáa vit onki gjørt.

– Tað einasta, vit fáa gjørt, gjørdu vit longu í februar mánaða og tað var at skriva Fíggjarmálastýrinum bræv, har vit inniliga heittu á tað um at forða fyri, at Teistin kom í somu støðu, sum Brimil.

## Støðan álvarsom

Sostatt er Bjarni Djurholm í teirri løgnari støðu, at hann hevur evstu ábyrgdina av, at Strandferðslan virkar, men samstundis hevur hann onga ávirkan á tær samráðingar, sum kunnu fáa hana at virka.

Hann sigur, at støðan verður meiri og meiri ivingarsom.

Strandferðslan hevur ongi avloysaraskip og hartil eru skipini gomul og slitin. Fær okkurt av teimum brek, so at tað ikki fær siglt, verður avleiðingin, at oyggin, sum tað siglur til, missur alt ferðasamband yvirhøvur og tað tola hvørki ferðafólk ella vinnulív.

Bjarni Djurholm sigur, at tí fær hann onki gjørt, uttan at heita á partarnar um at taka samráðingarnar upp aftur.

Tá ið ósemjan var um Brimil, kravdi Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, sum varaði av málinum, at tað kom fyri á landsstýrisfundi. Tað hevur tú ikki gjørt?

– Brimil kom á landsstýrisfund tí, at politisk semja var um at taka málið upp og at fara í tingið við tí. Men á slíkum støði verður málið um Teistan slett ikki viðgjørt.

Bjarni Djurholm sigur, at hann hevur hildið, at ósemjan um Teistan er so einføld og lítil, at tað skuldi verið púra óneyðugt.

– Tað er bara ein spurningur um at finna eina semju. Tað er altíð ein vandi fyri at fara í tingið við slíkum málum og at løggeva um slík mál í heilum, ikki minst tá ið talan er um eitt smámál, eftir mínum tykki.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum sigur, at hann tí ikki fær gjørt annað enn at heita á partarnar um at taka samráðingarnar uppaftur og at loysa málið.

## Fyribyrgja

Annars heldur hann, at gongdin er lítið hugalig, um vandi nú skal vera fyri, at øll nýggj, almenn skip, sum koma, skulu ligga í mánaðir tí ósemja er um lønina.

– Næsta skipið sum kemur, verður nýggja suðuroyarferjan, sum kemur um trý ár og vónandi er støðan broytt til tá.

– Men eg ivist heldur ikki í, at Fíggjarmálastýrið fer at hava málini um Brimil og Teistan í huganum, næstu ferð vanligar sáttmálasamráðingar verða aftur við manningarfeløgini, so at byrgt verður fyri, at slíkt hendur aftur, sigur Bjarni Djurholm.

# Vandi fyri verkfalli í Havn



*– Nú er vandi fyri at alt vegarbeiði og alt annað arbeiði í Havn, har brúk er fyri skervi og gróti, verður lagt lamið. Nógv virksemi er í Havnini so tað fer at raka meint. Eitt nú fer tað at raka vegarbeiði í Tórsgøtu, men tað fer eisini at raka húsabygging og annað byggiarbeiði*

**– Tað skal ongin forða okkum, tí vit vilja hava frítt at fara allastaðni í Kommununi, sigur Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag**

ÓSEMJA
*Áki Bertholdsen*

Ósemja um ein arbeiðsmann í asfalt -og skervverkinum hjá Landsverkfrøðinginum í Hundsarabotni hóttir nú við at leggja ein part av Havnini lamna.

Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, sigur, at verður ósemjan ikki loyst, fer Havnar Arbeiðsmannafelag at seta tiltøk í verk.

Ósemjan er um, at ein arbeiðsmaður í Hundsarabotni, sum er limur í Havnar Arbeiðsmananfelag, er sendur til hús.

Karl Johansen sigur, at tað er eftir kravi frá Kollafjarðar Arbeiðarafelag, at maðurin er sendur til hús.

Tað skilst, at hendan ósemjan er ein avleiðing av, at Kollafjarðar kommuna á nýggjárinum kom upp í Tórshavnar Kommunu.

– Ein av arbeiðsmonnunum í Hundsarabotni er limur í Havnar Arbeiðsmannafelag. Men nú hevur Kollafjarðar Arbeiðarafelag kravt, at antin var hesin maðurin sendur til hús, ella fóru allir hinir arbeiðsmenninir í Hundsarabotni at leggja arbeiðið niður.

– Tað endaði so við, at Landsverkfrøðingurin sendi mannin til hús.

– Orsøkin til, at Kollafjarðar Arbeiðarafelag ikki vil arbeiða saman við manninum, er, at hann er limur í Havnar Arbeiðsmannafelag.

–Kollafjarðar Arbeiðarafelag krevur, at skal maðurin arbeiða í Hundsarabotni, skal hann limast inn í Kollafjarðar Arbeiðarafelag.

Karl Johansen sigur, at hetta finnur hann seg ikki í. Í gjáramorgunin hevði Havnar Arbeiðsmannafelag bæði fund við Tórshavnar Býráð og við Landsverkfrøðingin um støðuna.

Úrslitið av fundunum er, at fundur skuldi fyrst verða við Kollafjarðar Arbeiðarafelag, áðrenn onnur stig verða tikin.

## Ongin skal forða okkum

Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag sigur, at nú verður bíðað eftir tí fundinum.

– Men førir hann ikki til eitt úrslit, fara vit at seta tiltøk í verk.

Hann sigur, at fáast viðurskiftini ikki í rættlag, fer Havnar Arbeiðsmannafelag at nokta limum sínum at taka skerv, asfalt, ella nakað annað úr Hundsarabotni, til viðurskiftini eru fingin í rættlag.

Hann sigur, at hendir tað, fellur framleiðslan av asfalti og skervi í Hundsarabotni við eini helvt, tí umleið helvtin verður brúkt í Havn.

Hendir hetta, fer tað m.a. at leggja alt vegarbeiði í Havnini lamið, umframt nógv annað arbeiðið, eitt nú húsabygging og annað, sum krevur grót, skerv og asfalt.

Summarið er vanliga tíðin, tá ið nógv vegarbeiðið er í Havnini, og verður arbeiðið lagt stilt, fer tað at føra til, at teir ferðslutrupulleikar, sum slíkt arbeiði førir við sær, fer at draga út. Karl Johansen sigur, at hann finnur seg ikki í slíkari framferð, sum Kollafjarðar Arbeiðarafelag hevur víst.

– Vit eru øll í einari kommunu, bæði Kollafjørður og Tórshavn. Vit hava onki ímóti, at limir í Kollafjarðar Arbeiðarafelag arbeiða í Havn, hóast teir varðveita limaskapin í Kollafjarðar Kommunu.

– Men vit krevja eisini at vit hava frítt at fara í allari kommununi, eisini í Kollafirði. Tað skal ongin forða okkum at arbeiða, hvar í kommununi, vit vilja, sigur Karl Johansen.

– Áðrenn kommunurnar vórðu lagdar saman, hoyrdi Hundsarabotnur undir Kollafjarðar Arbeiðarafelag. Men nú eru kommunurnar lagdar saman so at bæði Hundsarabotnur og Kollafjørður er í Tórshavnar Kommunu.

Og vit finna okkum ikki í, at ein limur í Havnar Arbeiðsmannafelag skal verða tvingaður at skifta felag fyri at sleppa at arbeiða í einum ávísum parti í síni egnari kommunu. Ein limur hjá okkum hevur tískil fullan rætt at arbeiða í Hundsarabotni undir liðini á Kollfirðingum.

– Tað skal ongin tvinga hann at skifta felag, so at hann missur rættindi til pensjón og onnur rættindi, sum hann hevur hjá okkum, sigur Karl Johansen.


All the best music for you...



We have a wide selection of all kinds of music - from the old Faroese ballads to the newest pop and rock...

3arin

SMS Shopping Centre · Tel 353533 · Fax 353536 · www.3-arin.com · cd@3-arin.com